Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Høgni Hoydal, løgtingsmaður

Svarari: Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, landsstýrismaður í bústaðarmálum

Evni: Broytingar í nevndini fyri Bústaðir og ákærur um lógarbrot

Spurningar:

1. Hvør gjørdi í hvørjum einstøkum føri tilmælið um at velja teir nýggju limirnar í víðkaðu nevndini fyri Bústaðir – var tað umsitingin, landsstýrismaðurin sjálvur, ella annar persónur ella instansur?
2. Hvørjar vóru tær ítøkiligu og sakligu grundgevingarnar fyri at velja teir nýggju stýrislimirnar, og hvussu eru tær skjalfestar sambært fyrisitingarlógini?
3. Hvør gjørdi tilmælið til at skifta tann undansitandi stýrisformannin út, og hvussu er tað grundgivið og skjalfest sambært fyrisitingarlógini?
4. Var tað landsstýrismaðurin, sum ynskti, at nýggi formaðurin skuldi vera umboðið úr hennara egnu fyrisiting?
5. Var nakað frámæli gjørt um ymsu persónarnar, ið eru valdir/frávaldir, og hvussu er tað skjalfest og grundgivið sambært fyrisitingarlógini?
6. Kann landsstýrismaðurin vátta ella avsanna ákærurnar frá einum av nýggju stýrislimunum um, at Bústaðir hava fyrisitið ímóti lógini og kunngerðunum fyri Bústaðir – og hvat hevur hon gjørt við hesar ákærur?
7. Um so er, at ákærurnar eru rættar, hvørjar avleiðingar fær tað?
8. Um so er ákærurnar eru falskar, hvørjar avleiðingar fær tað?

Viðmerkingar:
Tað er komið alment fram, at landsstýrismaðurin formliga hevur valt tríggjar nýggjar limir í víðkaðu nevndina fyri Bústaðir, umframt tvey afturval frá gamla stýrinum. Sambært fyrisitingarlógini skulu allar fyrisitingarligar avgerðir vera sakligar, grundgivnar og skjalfestar.

Tí verður spurt, hvør hevur gjørt tilmælið og skotið upp, hvør skal veljast, og um hvussu hetta er grundgivið og skjalfest. Biðið verður um svar fyri hvønn einstakan stýrislim.

Eisini verður spurt, um fyrisitingin ella onnur hava frámælt nakrari avgerð, og um so er, hvussu hetta er skjalfest og grundgivið. Biðið verður um svar fyri hvønn einstakan stýrislim.

Hartil verður spurt um tær sera álvarsligu ákærurnar, ið eru sendar Almannamálaráðnum og eru komnar fram alment frá einum av nýggju stýrislimunum móti stjóra og leiðslu í Bústøðum. Spurt verður, hvat landsstýrismaðurin hevur gjørt við hesar ákærur, og hvørjar avleiðingar tær fáa, antin nakað hald er í teimum ella ikki.

Á Løgtingi, 7. mai 2021

Høgni Hoydal